# BØNARLØTAN

**SEPTEMBER** **2025** **40. árg.**

## *1. Mánadagur* *1. Kong. 7.27-51*




**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 4, Boas 3**

Summarið er farið at halla, og samkoman byrjar at fyllast aftur bæði við kendum og nýggjum andlitum. Vit fara at bjóða nýggjum útisetum vælkomnum við hugnakvøldi 24. sept. Biðið fyri komandi hálvári, fyri teimum nýggju lesandi og samkomuni.

**KRINGVARPIÐ**

5. okt. útvarpsmøti, Kristnastova

**EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)**

Sunnukv......kl. 21 ....Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskv..........kl. 21 ....Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Týsdagur* *Áp. 28.16-31*

**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 13, Emma 9**



Fyrst í sept. kemur eitt arbeiðslið úr Føroyum at hjálpa okkum at gera nýggja bygningin kláran til brúk. Vit flyta eftir ætlan inn síðst í sept.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Vit verða í Føroyum fram til 3. okt. og vilja vegin vitja samkomurnar.

**3. Mikudagur 1. Kong. 8.1-21**
**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Bíbliuskúlin hjá NTM her í North Cotes byrjar aftur 3. sept. Biðið, at næmingarnir falla væl til, og fyri starvsfólkunum, sum tey leggja undirvísing og praktisk viðurskifti til rættis.

**ZAREPTA**

Mansstevna 5.-7., kvinnustevna 12.-14., hjúnastevna I 19.-21. og hjúnastevna II 26.-28. sept.

## *4. Hósdagur* *Sálmur 63*

**Susan og Øssur Berghamar**



Vit gleðast um tey, sum vilja fylgja Jesusi, eisini við at lata seg doypa. Fimm fólk, sum savnast við okkum, vórðu doypt á Amager Strand 12.

juni. Tað var ein góð og talandi løta. Biðið, at Harrin framvegis ger sítt verk millum okkara. Ætlanin er at koma til Føroya í sept. og steðga góðar tvær vikur. berghamar@kristnastova.dk



**Mission Aviation Fellowship,**
**MAF Føroyar**
**Andrias Hansen,**
**trúboðaraflogskipari við MAF**

Eg arbeiði enn sum floglærari. Skal giftast í sept.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 11**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein**

## *5. Fríggjadagur* — *1. Kor. 7. 21-40*

**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Eg skal tala á bíbliutíma fyri vaksin og ung í heimasamkomu okkara. Sjálv eru vit bæði í einum slíkum *sunnudagsskúlaflokki*, har tey flestu eru í sjeytiárunum. Eg undirvísi har einar tvær ferðir um mánaðin og eti eina ferð um vikuna saman við 8-10 av hesum monnunum. Vit møtast soleiðis at tosa um lívsins viðurskifti, Skriftirnar og biðja saman.

## *6. Leygardagur* — *1. Kong. 8.22-40*

**DANMARK – Anna og Hans Djurhuus**

Fyrsta føroyska møtið í Aalborg eftir summarsteðgin verður leygard. 6. sept. kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2A, Aalborg.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**



**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

## *7. Sunnudagur* *1. Kor. 8.1-13*

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**
7. sept. fara vit við bili til fundir í Onglandi og Týsklandi. Síðani verða vit fýra vikur í Ukraina, har vit vitja ECM trúboðarar, og Simon skal saman við øðrum ECM leiðarum hava skeið fyri níggju nýggjum ukrainskum trúboðarum.

## *8. Mánadagur* *1. Kong. 8.41-66*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 16**



Samfelagsstevnan í Dakar var lívgandi. Øll, sum arbeiða við NTM í Vesturafrika, vóru saman, eini 100 fólk. Sana, ein av teimum trúgvandi í Guinea, fekk sýru í eyguni, tá ein akkumulatorur sprongdist framman fyri honum. Hann er komin væl fyri seg, men sjónin er viknað, og eyguni tola ikki so væl ljós. Átta nýggir trúboðarar skulu nú læra franskt. Biðið fyri Sana og fyri trúboðarunum, at teir falla væl til.

## *9. Týsdagur* *1. Kor. 9.1-27*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 8**

Nýtt skúla- og samkomuár byrjar. Tveir menn, sum herfyri komu til trúgv, vórðu doyptir í aug. Tað var ein dýrabar løta. Vit síggja alsamt nýggj andlit í samkomuni. Biðið, at vit nýta lagaligu løtuna at røkka út við umsorgan og kærleika og samstundis vísa á Jesus.

*Í dag fyllir Samuel Mikkelsen 11 ár

## *10. Mikudagur* *1. Kong. 9.1-28*




**OM, LOGOS HOPE, TeenStreet**

Avloysari er nú komin fyri Elsu í Skorini, ið hevur verið leiðari fyri vaskaríið á Logos Hope. Hon byrjaði í stutttíðartænastu í jan. og fer nú av í dag. Vit takka Elsu fyri tænastuna. Biðið fyri manningini, nú ein triðingur mynstrar av í hesum døgum. Millum 15 og 20 føroyingar góvu sítt lív til Jesus á TeenStreet leguni, og tríggir ungir menn vilja fara út í stutttíðartænastu. Takkið og biðið fyri føroyska ungdóminum. Haldið á at biðja fyri OM Føroyum og tí, sum stendur fyri framman.

**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 14, Tabita 11, Debora 9, Natan 6**

## *11. Hósdagur* — *Sálmur 64*

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Minnist serliga Jens Paula í Dali, at Harrin styrkir og signar, nú hann arbeiðir burturav við TeknBíbliuni í Føroyum. Málið er fyrst at geva út fýra kapitlar av Jóh. ev. á video. Vit takka Harranum, at tvey deyv vórðu doypt í summar.



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 15**

## *12. Fríggjadagur* — *1. Kor. 10.1-15*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Vit eru takksom fyri eitt gott summar og fyri øll tiltøkini bæði fyri børnini og tey ungu. Nú byrjar nýggja skráin av álvara. Biðið fyri John og teimum elstu, at teir kenna Harrans vísdóm og frið í arbeiðnum.

**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 17, Lydia 15**

*Í dag fyllir Hanna Abrahams 2 ár

## *13. Leygardagur* *1. Kong. 10.1-29*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Hóast avbjóðingar, so eydnaðust legurnar væl. Vit høvdu so røsk, evnagóð starvsfólk úr Føroyum og upp í fýra tolkar, ið allar hava verið á legu sum børn og sum eru komnar til trúgv sum tilkomnar. Ein drongur játtaði trúgv.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Sunnudagur* *1. Kor. 10.16-11.1*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Vit takka inniliga fyri alla hjálp til legurnar í summar. Fyrst í sept. byrja vit við barnamøtum fyri øllum børnum, sum hava verið á legunum í summar. Biðið, at nógv børn koma, og at tey skilja evangeliið.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

## *15. Mánadagur* *1. Kong. 11.1-22*

**Atlantic Mission í Hirtshals – juli 2025**

Tilsamans 26 vóru í toyminum. Vit skipaðu fyri ókeypis kafé, vóru í gongugøtuni, á húsavitjanum og høvdu barna- og onnur møti í

Malta og í kaféini. Nógv vildu tosa og hoyra um trúgv, og fleiri vildu hoyra um, hvussu ein verður frelstur. Harrin kallar mong. Biðið, at tað, ið verður sáað, ber ávøkst.




**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



*Í dag fyllir Kano Mortensen 16 ár

## *16. Týsdagur* *1. Kor. 11.2-16*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 17, Jónatan 15, Markus 13, Evita 10, Joy 8**

Biðið, at tiltakið, vit vanliga hava tjóðardagin 16. sept., eydnast væl, og at evangeliið kemur greitt fram og ber ljós til sálir, sum eru í myrkri.



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

## *17. Mikudagur* *1. Kong. 11.23-43*

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

Summarlegurnar gingu væl, og nógv børn vildu fylgja Kristusi. Biðið, at vit møta teimum og læra tey gjøgnum veturin.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Hósdagur* *Sálmur 65*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna Rodda**
Bønarløtan heilsar Annu og syninum Charlton við djúpastu samkenslu, nú Harrin so brádliga tók David heim til sín. Hann var 78 ár og enn virkin í evangeliska arbeiðnum í Senegal, hóast tey búðu í Onglandi. David gleddist, nú nýggja bíbliuútgávan, sum er partur av hansara lívsverki, var júst komin til Senegals. Biðið, at Harrin styrkir Annu og Charlton í stóra sakninum!

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 12, Micah 12**

*Í dag fyllir Olivia Poulsen 2 ár

## *19. Fríggjadagur* *1. Kor. 11.17-34*

**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**
Vit takka fyri ein sera góðan mánað heima í summar. Summartiltøkini í Eysturturkalandi eru av, bæði vitjanir og *street outreach*.

Ein bólkur av 12 trúgvandi vilja fegin savnast regluliga. Trupult er at fáa samkomur at festa rót. Vit fara til Turkalands síðst í sept.



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

## *20. Leygardagur* — *1. Kong. 12.1-33*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 8, Timon 6, Manuel 1, Salome 1**

Vit hava nú spæliløtur fyri børn aðru hvørja viku fyri ættarbólkar og kovolbygdir, sum vilja vera við. Ofta eru um 50 børn við. Tey stuttleika sær og hava álit á okkum. Synir okkara fáa soleiðis vinir, og familjurnar, ið koma saman, síggja at børnini hava tað stuttligt. Vit vilja gera hetta til evangeliska tænastu, tá vit verða før fyri at undirvísa á kovolmálinum.

## *21. Sunnudagur* — *1. Kor. 12.1-13*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 11, Abigail 6**

Í summar vóru vit á kristnari legu saman við aðrari familju. Vit leita eftir hóskandi staði í grannalagnum at hava møtir. Okkum tørvar Guds leiðslu og signing í ymisku tænastunum, vit standa í. Takk, at tit trúføst stuðla og biðja fyri okkum.

## *22. Mánadagur* *1. Kong. 13.1-34*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 4, Selah Rose 2**
Tað gekk betur enn væntað, tá Daniel fór ein túr til Asmat í aug. saman við nøkrum av okkara leiðarum á økinum at loysa eina trygdaruppgávu. Nú er málið loyst, og vit flyta helst aftur til Asmat um 1-2 mánaðir. Tað verður ein avbjóðing at vera einsamøll í bygdini, men tað lívgar okkum at síggja, hvar ið Kristus leiðir okkum. Biðið, at Harrin signar og styrkir, og at Hann sendir samstarvsfelagar.

## *23. Týsdagur* *1. Kor. 12.14-31*

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 16, Nana 13, Louie 11, Rio 6**
Vit takka fyri tíðina heima í Føroyum í aug. Nú byrjar sunnudagskúlin aftur. Biðið, at børn, sum koma til enskt, eisini vilja koma í sunnudagsskúla.



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Vit gera klárt til túrin til Filipsoyggjar síðst í nov.

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**

## *24. Mikudagur* *1. Kong. 14.1-31*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 17, Noah 16, Karis 12, Judah 10, Ethan 8**

Vit flyta nú inn aftur í heim okkara í Lele og skulu venja okkum við lívið í frumskóginum. Vit sakna Nya og Noah, sum eru í skúla í Goroka – 1,5 tíma flogferð frá okkum. Biðið fyri undirvísingini og læruni í samkomuni, og at vatnpumpa, sólskipan, el og internet virka. Biðið eisini, at arbeiðið við lendingarbreytini skal ganga væl.



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 7, Evelyn 5, Olivia 2**

*Í dag fyllir Jude Poulsen 7 ár

## *25. Hósdagur* *Sálmur 66*

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 13, Petra 11**

Fløguútgáva verður í Salt og Lívdini 27. og 28. sept., nú 10 ár eru liðin, síðani fyrsta fløgan kom út. Skal eisini til Noregs, har Harrin hevur opnað dyr.



- **Birgit og Svenning av Lofti**
- **Rutt og John í Skemmuni**
- **Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
- **Birita og Petur á Roykheyggi**

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Eg eri nú flutt inn í egin hús í Porkeri og veit ikki heilt, nær eg fari aftur til Senegals – helst fyrr enn seinni! Ungi umsetarin heldur fram at umseta GT, og eg gjøgnumgangi ymiskt hjá honum. Ein av eldru trúgvandi monnunum, sum hevur verið ein dyggur stuðul til bíbliutímarnar, er farin at taka meiri ábyrgd í hesum tímum, eftir at Sunkaru doyði í des. Hann hevur tó fingið heilsutrupulleikar. Biðið, at Harrin grøðir og leiðir.

## *26. Fríggjadagur* *1. Kor. 13.1-13*



**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Vit gleða okkum at byrja verkið aftur. Biðið fyri Stevn, møtum, samtalum, trúarverjuni og verkinum í Pakistan. Nógvir ungir menn koma til trúgv í Pakistan og byrja at fylgja Jesusi. Nógv uppfylging skal til. Í løtuni hjálpa vit mest til við bíbliuundirvísing.

## *27. Leygardagur* *1. Kong. 15.1-34*

**OM, SUÐURAFRIKA, OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 2**




Vit høvdu góðar og lívgandi vikur í Føroyum. Takk fyri stuðul og bønir, og at tit hugsa um okkum. Eitt nýtt toymi er byrjað á skúlanum – tey eru bert átta. Biðið, at tey mennast eftir vilja Harrans.

## 28. Sunnudagur — *1. Kor. 14.1-20*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 17**

Tim varð eftir hvítusunnu boðin at skipa fyri og tala á samfelagsmøtum í Naplud, Filipsoyggjum, har vit búðu fyrr. Tim og tríggir aðrir talaðu út frá Gal. kap. 1 í fýra dagar. Talið á teimum vitjandi vaks dagliga, og síðsta dagin var salurin fullur. Ein maður viðmerkti, at: *Hetta fær meg at leingjast eftir meira!*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

## 29. Mánadagur — *1. Kong. 16.1-34*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 13, Noah Kristian 11**

Síðstu árini eru nógv fólk løgst aftur at samkomu okkara *The Gathering*. Biðið fyri samkomuni, okkara leikluti í henni og serliga fyri teimum, ið nýliga eru blivin partur av samkomuni.



Útgevari KBS (Kristniboðssambandið)
Blaðnevnd Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang.
Avgreiðsla Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
Uppseting Grafikmaster, tel. 502022
Myndasavn info@grafikmaster.fo
Prent Føroyaprent, tel. 314555
Teldupostur prayerservicefo@gmail.com
Heimasíða www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *30. Týsdagur* *1. Kor. 14.21-40*

VERITAS FORUM

*Exploring the ideas that shape our lives*

Dr. Francis Collins, víðagitin íleguserfrøðingur, sigur frá ferð síni sum ungur granskari frá gudleysi til trúgv og setir spurningin: *Eru vísindi og trúgv sameind um heimsfatan?*

Fyrilestur á California Institute of Technology, 2009

www.youtube.com/watch?v=EGu_VtbpWhE

**BÓKATÆNASTAN**

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!










FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo